# oregi

Teir fóru til Noreg eftir kunsttøðum at sigla til Riga í Letlandi. Her høvdu russarar valdið, og hetta sást eisini! Her var so øgiliga kalt, heili 40 kuldastig. Tað vóru dagar, tað ikki kundi arbeiðast fyri kulda.

Nú hevur Thomas verið so mikið leingi í Danmark, at hann verður innkallur til herin. Sum royndur sjómaður kom hann í marinuna, har hann var í eitt lítið ár. Ein partur av arbeiðinum var at royna torpedoir.


*Tummas sum marinari*

### Thomas fer í land

Aftaná fór Thomas á háskúla í Slagelse. Ein lærari har var Salomon Joensen úr Elduvík, sum seinni gjørdist prestur í Føroyum.

Nú følir Thomas seg ikki so væl. Hann fer til lækna og fær staðfest, at hann hevur tuberklar. Hann liggur fyrst tríggjar mánaðir á Øresunds hospitali og síðan líka leingi á sanatorium í Roskilde. Hann verður “pustaður”, t.v.s. at sjúka lunga verður lagt stilt eina tíð. Henda viðgerð mátti regluliga endurtakast í trý ár. Tummas gerst frískur aftur.


*Jensia, kona Tummas. Hon doyði í 1988*

Tá fer hann á telegrafistskúla í Keypmannahavn. Tá ið hann er liðugur, søkir hann arbeiði á telegrafstøðini í Havn og fær tað. Hetta var kortini ikki nakað júst fyri hann. Hann fór at arbeiða fyri Gunnar Mortensen, sum var múrari. Hetta var nakað sum Tummas dámdi. Tískil kom hann í læru hjá Gunnari fyri arbeiðsmannaløn, og hann fekk sveinaprógv í 1950, 32 ára gamal. Tað er sum múrari, at fólk kenna Thomas. Hann arbeiddi leingi hjá Lamhauge & Waagstein. Thomas var kendur sum eitt arbeiðsgrev. Snøggur er hann eisini. Hetta sæst ikki minst á minnisvarða fyri mentamannin og forfaðirin Jóannes í Króki, sum hann hevur gjørt á Sandi.

### Fann konu í Mílafelagnum

Í Danmark kom Thomas at hitta Jensiu f. Hentze úr Skúvoy, sum var sjúkrasystir. Hon var ein av teimum mongu føroyingum, sum vóru innifrystir í Danmark undir krígnum. Tey komu at kennast í Kristiliga Ungmannafelagnum í Keypmannahavn, har so nógvir føroyingar komu. Oddamaður her var presturin Emil Joensen. Tí varð felagið millum manna kallað Mílafelagið.

Tey giftist í Zionskirkjunu í Keypmannahavn. Tey fingu sonin Rahm, sum við konuni Rannvá og børnum býr áfast hjá Tummasi. Abbabørnini hjá Tummasi eru Johan, Laurits, Jensia og Magnus. Thomas er eisini blivin langabbi.

Gjøgnum konuna fekk Thomas aftur samband við Skúvoy, har hann er komin nógv og har hann eisini eigur hús. Í Skúvoy verður eisini tikið til, hvussu hann roynir at dugna bygdini. Hann tekur altíð eina hond í, har tað treingir til.

Tey láta eisini væl at blíðskapinum hjá Tummas og Jensiu. Ein bróðursonur hennara tekur til, at hann føldi seg rættuliga sum heima, tá ið hann sigldi út frá Havnini og plagdi at koma inn til teirra.

Sigast kann um Thomas, at hann er eitt skilafólk, sera sáttligur og hugnaligur at práta við. Hann hevur verið virkin í Ebenezer á ymiskum økjum. Heima hjá honum liggja takkarbrøv frá donskum verjuskipum, har Thomas hevur sent bibliur umborð. Thomas sigur, at hann varð umvendur fyri 55 árum síðani eftir ein vitnisburð hjá tí tá 18 ára gamla Trónd Eysturstein. Hetta hevur verið ein stórur partur av hansara lívi. Hann hevur gingið trúliga á møti og hevur ongantíð dult fyri, hvat hann metir at vera tað týdningarmesta í lívinum.

Thomas verður ikki heima føðingardagin. Men vit fara at ynskja honum hjartaliga tillukku við hesum kappaaldri.

**ó.**

# Gullbrúdleyp



Leygardagin 6. september kunnu bóndahjúnini Maria og Ólavur og Dalsgarð á Velbastað halda gullbrúdleyp.

Maria er ættað úr Klaksvík, dóttir Anton Karl Sofus Kruse av Eiði og Elsebeth Malenu, f. Hansen, av Norðoyri. Ólavur er av Valbastað, sonur Dion og Jóhonnu Dalsgarð, f. Olsen, bæði av Velbastað. Maria og Ólavur fylla bæði 70 ár í ár.

Fyrstu árini eftir at tey vórðu gift, búðu Maria og Ólavur í Havn, har hann arbeiddi sum timburmaður.

Í 1968 bygdu tey sær hús á Velbastað. Um sama mundið yvirtóku tey bóndagarðinum Uppi í Stovu. Tey vóru so bóndahjún á Velbastað, til sonurin Tórfinnur festi garðin í 1985.

Maria og Ólavur eiga fýra synir saman: John, Eyðfinnur, Tórfinnur og Arnbjørn.

Tilsamans eiga teir tíggju børn, millum 8 og 24 ár, sum sostatt eru ommu- og abbabørn hjá gullbrúðarparinum.

Teimum verður ynskt hjartaliga tillukku við hátíðardegnum.

**Heilsan**
**Synirnir við familju**

# Guitarframsýningin ’08

Guitarframsýning verður í Müllers Pakkhúsi 4. og 5. oktober 2008, har møguleiki verður at síggja flottastu, serligastu, elstu og dýrastu guitararnir í landinum, alt á einum stað. Guitarframsýningin 2008 fer at hýsa hesum framúrskarandi ognunum sum í fleiri førðum samla støv heima hjá fólki í Føroyum.

Fremstu tónleikarar í landinum fara at framføra. Eitt nú Guðrið Hansdóttir, Kári P, Martin Joensen, Uni R. Debess og Rasmus Rasmussen. Heiðrikur á Heygum hevur sniðgivið plakat til tiltakið, sum fólk kunnu ogna sær.

Enn er pláss fyri guitarum. So um onkur hevur ella kennur onkran sum eigur ein serligan guitar, eru fólk vælkomin at skriva til: guitarframsyning@gmail.com, ella ringja til fyriskiparan av framsýningini Regin Dalsgaard tel. 596061

Opið frá kl. 14.00 til 20.00. Atgongumerki við dyrnar kr. 100,- (børn ókeypis). Atgongumerkið er galdandi báðar dagarnar. Kafé verður eisini, har ið fólk eitt nú kunnu keypa sær kaffi, sodavatn og køkur.

Yvirskotið av tiltakinum fer til Føroya Felag móti Krabbameini.